**FRÁ HALDÓRSVÍKAR AVHALDSFELAG**
Ársveitsla fyri limir við gesti verður 30. jan. kl.20.Kostnaður kr. 200. Flemming og vinmenn spæla til dansin.Tilmelding hjá einum av nevndarlimunum áðrenn 20. jan. Vit ynskja tykkum øllum eitt gott og eydnuberandi nýggjár.
*Nevndin*

**RÓGVIMASKINA**
til sølu, lítið og onki brúkt fyri 1000 kr.
*Tlf. 590559*

**HANDILS/GOYMSLU HØLI Í HAVN**
Mitt í Havn til leigu, 170 m2.
*Tlf. 212345*

**ÁRSVEITSALAN**
hjá Eldrafelagið Borgin sum skuldi verða 16. januar er úsett til 23. januar kl. 19, freistin at koma við er týsdagin 19. januar 2010.
*Eldrafelagið Borgin tlf. 214474*

**APPLE IPOD NANO**
16 gb, svartur, til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. +298258871*

**MYNDATÓL CANON EOS 350D**
Sum nýtt, lítið og onki brúkt, battarí greb fylgir við, 3 memory kort (2 GB, 2x512 MB), kortlesari til telduna (USB), universal løðari umframt billøðari, kr. 2.500.
*Ring/sms'a 736066*

**GOLDIN FERÐ TIL DK.**
Er tað nakar, ið skal til DK við Norrønu í januar, sum kann taka bil okkara við úr Føroyum. Vit gjalda sjálvsagt ferðaseðilin.
*Tlf. +4546401861 ella +4530584446*

**SONY LINSA DT 16-105 F3.5-5.6**
nýggj og óbrúk, til sølu. Passar til øll Sony SLR kamera.
*Tlf. 250000*

**MASSAGUBONK YNSKIST**
*Ring/sma´a 281111*

**YNSKIST**
Takvindeyga breidd 68 cm og alminium takplátur uml. 16 stk í longd 4,30 m ynskist.
*Tlf. 228536*

**TORGERÐ SUÐUROY SELUR Í HAVN**
Eg selji út fyri sámuligar prísir. Nógvir ymiskir møblar, stell, málningar, breyðskerarar, ljósakrúnur, lampettir , spegl o.m.a. í Joto í Havn í jan. Opið frá týsdag til og við fríggjadag frá kl. 10.00 til 17.30.
*Tlf. 573999*

**EIN YVIRLIVILSISDRAKT**
Til sølu.
*Tlf. 226596*

# TILTØK

## Gudstænastur 17. jan.

**Vesturkirkjan:** kl. 11.00, lestur
**Havnar kirkja:** kl. 11 lestur.
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11, Kjartan Mørkøre. Sunnudagsskúli er undir gudstænastuni..
**Bøur:** kl. 11, David Johannesen, altargongd
**Kvívík:** kl. 12, Theodor E. D. Olsen
**Vestmanna:** kl 11.00, altargongd, Inga Poulsen Dam
**Funningur:** kl. 12 messa, Emil Olsen
**Sjóvar kirkja:** kl.12.00, Bjarni Bæk innsetur Símun P. Jacobsen sum sóknarprest í Sjóvar prestagjaldi
**Christianskirkjan:** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen.
**Norðoya Sjúkrahús:** andakt kl. 10. Magnus Brahé Jørgensen
**Hvannasund:** kl. 12.00, Elsa Funding, altargongd
**Norðoya Røktarheim:** kl. 14.30, Elsa Funding
**Húsar:** kl.12.00, Hanus á Gørðum, altargongd
**Øravík:** kl. 11, Jónsvein Bech
**Fámjin:** kl. 12, Jónsvein Bech
**Porkeri:** kl. 12.00, altargongd og dópur, Patrick de Neergaard
**Vágur:** kl. 11.00, pastor Heri Kjærbo frá Tanzania

## Miðvika í Hoyvíkar kirkju

Mikukvøldið 13. jan. kl 19 verður Miðvika í Hoyvíkar kirkju, har samfelagsgranskarin Dennis Holm fer at halda fyrilesturin: *Byggja vit eldrabúðstaðir á røttan hátt?* Her er lagamanni hjá avvarðandi og politikarum at síggja, hvat ið kann gerast av nýhugsan, nú ið so nógvar kommunur ætla sær at byggja røktarheim.
Tiltakið fer fram í kirkjukjallaranum í Hoyvíkar kirkju

## Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík

Mikukvøldið 13. januar, klokkan 20: Møti
Fríggjakvøldið 15. januar, klokkan 19: Kongsins Herlið, børn 8-12 ár, børnini skulu møta heima hjá Jógvan & Astrið, Tjarnalág 18. Børnini verða koyrd heim aftaná møti. Klokkan 19: Ungdómurin møtast í samkomuni,farið verður til Vestmannar
Sunnudagin 17. januar, klokkan 11.30: Barnakórið venur, klokkan 12: Møti v/ sunnudagsskúla
Verið hjartaliga vælkomin øll somul.
Sí annars heimasíðuna *www.immanuel.fo*

## Ebenezer

Mikudag
kl. 20.00 Bønar- og lærumøti. Svenning á Lofti talar um Fyrsta brævJóhannesar kapittul 1.
Hósdag
kl. 12.30 Andakt
kl. 18.30 Sangvenjing – Gentukórið Kassia
kl. 20.00 Ungdómsmøti. Heðin Poulsen talar um eyðmjúkleika ella sjálvupphevjan.
Sunnudag
kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans. Jákup N. Olsen talar. Barnaansing er meðan møti er
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti. Barnaansing er meðan møti er.
Heimasíðan: *www.ebenezer.fo*

## Tórshavnar Hvítusunnusamkoma

**Yviri við Strond**
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

## Samkoman við Marknagil

**Skúlaheimið, Marknagilsv.75**
Sunnudagin kl.10.30: Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl.12.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl 20.00: Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

## Filadelfia, Tórshavn

Mikudagin 13. jan.
Kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum
Kl. 18.00 Delli
Kl. 20.00 Chill
Hósdagin 14. jan
Kl. 20.00 Bíbliuundirvísing v/ Pætur Bærentsen
Leygardagin 16. jan.
Kl. 21.00 Flare – Heðin Lamhauge talar
Sunnudagin 17. jan
Kl. 11.00 Morgunmøti “Hånd i handske” – Margreth Olsen talar
Kl. 12.00 Sunnudagsskúli
Mánadagin 18. jan.
Kl. 20.00 Bønarskúlin
*www.filadelfia.fo*

## Evangeliskt møti í Losjuni í Havn

Fríggjakvøldið 15. januar kl. 20.00 talar Poul Jul.
Leygarkvøldið 16. jan. kl. 20.00 talar Dánial Gaardlykke.
Sangir og vitnisburðir.
Verið hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið við Landavegin

Hóskvøldið møti kl. 20.00.
Sunnukvøldið møti kl. 18.00 v/ Sigurd Sørensen.

## Fríkirkjan Oasan

**Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00: After8.
Sunnudagin kl. 11.00: Guðstænasta v/ Jógvan Lydesen, kl 12.00: Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
*www.oasan.fo*

## Frelsunarherurin, Tórshavn

Mikudagin 13. jan. kl 15.00 Bønarmøti , kl 19.00 Cellegruppa fyri menn. Verður á Dalavegi 1
Hósdagin 14. jan kl 20.00 Heimaforbundið byrjar aftur eftir jólafrítíðina. Heimaforbundið er fyri kvinnur í øllum aldri.
Sunnudagin 17. jan. kl 11.00 Halgunarmøti v/ sunnudagsskúla, kl 17.30 Bønarløta, kl 18.00 Møti v/ Major Njál Djurhuus

## KFUM og KFUK í Havn

**Hoydalsvegur 6 / Varðagøta 9**
Mikudagin 13. januar kl. 19.00 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Hósdagin 14. januar. Onki verður í KFUK vegna bønarvikuna í meinigheitshúsinum.

## Meinigheitshúsið í Havn

Mikudagin kl 20.00 Bønarvikan heldur fram
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti ung tala og bønarvika heldur fram
Fríggjadagin kl. 20.00 Bønarvikan heldur fram
Leygardagin kl 20.00 Bønarvikan heldur fram
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli
Sunnudagin kl 17.00 Møti v/ Jógvan Garðsá. Bønarvikan endar
Øll eru hjartaligavælkomin

## Kedron, Vágar

Møtir og tiltøk hjá samkomuni eru at síggja á heimasíðu okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin í KEDRON til okkara møtir og tiltøk.
Vitja heimasíðu okkara fyri at síggja hesi. www.kedron.fo
Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi.
Verið hjartaliga vælkomin.

## Miðvágs Missiónshús

Mikudagin kl. 18:30 juniormøti.
Leygardagin kl. 15:00-17:00 Móttøka í sambandi við at húsið verður 75 ár
Leygarkvøldið kl. 20:00 ungdómsmøti v/ Reimund Langgaard.
Sunnudagin kl. 14:00 sunnudagsskúli og føðingardagsmøti v/ nátturða kl. 18:00. Sangbólkurin "Ljós" syngur og Øssur Kjølbro talar. Høvi verður at geva eina gávu til húsið. Hjartaliga vælkomin.

## Kollafjarðar Missiónshús

Bønarløta verður hóskvøldið kl. 19.30.
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00 og møti kl. 18.00 har mennirnir luttaka.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00 við Terja Davidsen
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna

Sunnudagin 17. jan. kl. 11: Morgunmøti við breyðbróting.

## Missiónsvikan í Missiónshúsinum í Vestmanna

**heldur fram:**
Mikudagur 13. jan.
kl. 19.30 Bønarmøti
kl. 20.00 Theodor Dam Olsen, prestur, “Syngi við” við vestmenningum, Hans Paula Højgaard, John Joensen, Hannu og Terja Jacobsen o.ø.
Hósdagur 14. jan.
kl. 19.30 Bønarmøti
kl. 20.00 Øssur Kjølbro úr Klaksvík
Fríggjadagur 15. jan.
kl. 19.30 Bønarmøti
kl. 20.00 TenSing-kórið úr KFUM í Havn o.o.
Leygardagur 16. jan.
kl. 19.30 Bønarmøti
kl. 20.00 Ólavur Jacobsen, Hósvík, Hvalvíkskórið syngur. Innsavnan
Sunnudagur 17. jan.
kl. 11.00 Guðstænasta og sunnudagsskúli í kirkjuni
kl. 17.30 Bønarmøti í missiónshúsinum
kl. 18.00 Jógvan Lamhauge úr Skopun. Manskórið úr Sandoynni syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

## Lívsins Orð, Saltangará

Mikukvøldið kl.19.30 Bønarmøti
Mikukvøldið kl.20,30 Ungdómsmøti
Sunnudagin kl.10.30 Møti v/ Paula Høj

## Siloa, Fuglafirði

Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. John í Skemmuni talar.
Fundarøð verður fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við John í Skemmuni, John Færø og Jens Bech.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## KFUM &K í Klaksvík

Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími við Øssur Kjølbro.
Evni: Túsundáraríkið.

## Soli deo Gloria

Mikudag kl 19.30 Dreingirnir samlast.
Hósdag kl 20.00 ungdómsmøti v/ Katrin Justesen og fleiri.
Sunnudag kl 18.00 møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

## Getsemane,

**Stangaskákið 1**
Hóskvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti.
Leygarmorgun kl. 10.00 er morgunbøn.
Sunnukvøldið kl. 18.00 er møti. Luttøka úr samkomuni Immanuel í Havn. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 06.15 er morgunbøn.

## Missiónshúsið í Skopun

Mikudagin kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Matt. 28. kap. Hjartaliga vælkomin.

## Aglow Suðuroy

Møti verður í Skúlanum í Sumba leygardagin 16/1 kl. 16.00. Lydia Smith úr Englandi luttekur.
Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

## Fylking/Tvøroyri

Evangeliskur fundur við Svein Petersen, Eddie Bech, Finnbjørn Nielsen o.fl. verður leygarkvøldið 16. jan. kl 20.

## Missiónshúsið Sumba

Møti verður við Nimrod & Jacob sunnukvøldið 17. januar kl. 18.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tilhaldið í Tórsgøtu

tlf: 316491/286491
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 09.00 – 17.00
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks
Mikudagur 09.00 Maskinbinding, Marita Guttesen
09.00 Veving, Joana Bjarnastein
09.00 Bindiklubburin
09.00 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga
10 -13.30 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491
Hósdagur 09.00-11.15 Bólkur 1 Óroynd Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen
11.45-14.00 Bólkur 2 Roynd Tekstviðgerð víðkað skeið, Páll Poulsen
14.15-16.30 Bólkur 3 Samskifta á alnótini, Páll Poulsen
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa: ”Den lukkede bog” Jette Kaarsból. Hittast 21. jan. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugað eru hjartaliga vælkomin.
14 – 16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
Fríggjadagur 09-17 Bindiklubbur
10.00 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin. Opið hús. Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## Føroyskur Dansur

Leygarkvøldið 16. januar skipar Tvøroyrar Dansifelag fyri 20. kvøldsdansi á Segloftinum á Tvøroyri.
Hini dansifeløgini í oynni luttaka, byrjað verður kl 22.00
*Tvøroyrar Dansifelag*

## Tilhaldið Hugnin

hevur opið mánadag, mikudag og hósdag frá kl. 13 til 17. Allar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mikudagin 13. og hósdagin 14. jan.: Myndaveving við Súsonnu í Jákupsstovu.

## Pensionistafelagið í Havn

Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

## Dagtilhaldið í Gøtubrá

*Opið týs- og hósdag kl. 15-18*

## Eldrafelagið Nón

Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tilhaldið Sóljan

*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag til hósdag
kl. 13.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.***

## Dagtilhaldið í Fuglafirði

Vit møtast í Lonini mánadag, týsdag og mikudag kl. 15.
Øll eldri eru vælkomin.

## Dagtilhaldið í Nólsoy

*er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.*

## Dagtilhaldið Blákollan á Oyri

Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.